# betri umstøður



*Arbeiðið uppá bátahylin í Skálafirði byrjaði fyrst í 90'arunum, steðgaði síðani aftur, men er nú av álvara farið í gongd aftur. – Tað hjálpir helst at ein skálamaður er formaður í havnanevndini í kommununi*
*Mynd: Snorri Brend*

## Typpafossur

Tá ið tú gongur oman í Tundradal (móti bygdini í Skálafirði, blðm.), er best at ganga oman við ánni sunnarumegin (vinstrumegin). Hiðani sæst yvir á Øksnagjógv og Typpafoss hinumegin dalin. Søgnin sigur, at har goymdi búrkroppurin, Ormur bóndi á Skála, líkini av oyrarbóndanum og soni hansara. Ormur hevði dripið báðar tveir. Hann fekk óivað samvitskubit seinni og avdúkaði seg, tá hann rópti hart í svøvni: »Klæðini liggja undir kvørnini og kropparnir undir Typpafossi.«

(Úr: Til gongu í Føroyum)

*- Vit plaga at fara á flot beint uttanfyri bygdina ella longri úti á fjørðinum, sigur Jóan Petur Petersen*
*Mynd: Snorri Brend*



Báturin er útgjørdur við øllum tí, sum krevst til ein slíkan bát. Hóast hetta, er tó ikki talan um veruliga drift innan útróður.
- Satt at siga, so brúka vit mest bátin tá vit fara at skjóta, ella vit fara ein túr við snøri á fjørðin.
Fyrr vóru nógvir bátar sum róðu út á fjørðinum ella settu gørn eftir sild. Soleiðis er tíverri ikki longur.
Teir á Typpafossi eru bert fáar túrar á útróðrum. Teir fara av og á fyri at fáa sær eitt kók.
Ein trupulleiki er eisini tann, at langt er at sigla, um teir ætla sær suður í fjørðin.
- Hetta kann taka ein góðan tíma hvønn vegin, sigur Jóan Petur.

## Náttúruperla

Mong ár eru liðin síðani at menn fóru undir at gera ein bátahyl í bygdini.
Hetta var fyrst í 90'unum, men steðgaði arbeiðið upp tá kreppan kom. Á heysti í fjør byrjaði arbeiðið av nýggjum, eftir at játtaðar vórðu 300.000 kr. til hylin.
Herfyri játtaði Runavíkar kommuna aðrar 400.000 kr. aftrat til endamálið, og nú verður miðað eftir at arbeiðið skal verða liðugt um eitt ár.
Talan er í fyrstu atløgu um ein bátahyl til bygdarfólkið, men dentur verður kortini lagdur á, at ætlanin er at skipa bátahylin sum eina havn til stuttleikabátar – eina sonevnda "marina"við plássi fyri eini 30 bátum.
Á landi er somuleiðis ætlanin at skipa økið soleiðis at ferðafólk skulu kunnu gista her við húsvagnum, eins og økið skal kunna bjóða áhugaverd tilboð til ferðafólk um summarið.
- Skálafjørðurin er ein náttúruperla burturav, og hevur framúr møguleikar til laksafiskiskap og náttúruupplivingar av alskyns slagi.
- Ætlanin er, at marina'in skal gerast ein miðdepil í menningini av Skálafjørðinum sum ferðamál, segði Klæmint Østerø, formaður í havnanevndini í Runavíkar kommunu við Sosialin fyrr í summar.